# ast



manningarnar post, mjólk, olju og annað farm. Her kom Vesturleið úr Miðvági, Pride úr Klaksvík og Smyril sunnaneftir. Ritan røkti siglingina í Sandoynna, út í Hest og Koltur og til Nólsoyar. Tróndur, Sigmundur og aðrir bátar hjá Mjólkaforsýningini sigldu inn á Skálafjørðin og norð í Sundalagið, umframt at mjólkarbátarnir eisini røktu regluliga flutningin til Kollafjarðar, Kaldbaks og bygdirnar har um leiðir. Umframt at aðrir bátar fluttu fólk og farm um firðir og sund, segði Heðin Mortensen m.a.

– Persónliga fegnist eg saman við mínum vinum, kenningum og ættarfólki í suðri, nú ein nýggjur Smyril kemur at røkja siglingina. Nú hava vit eitt skip, sum er bygt til at sigla hesa mangan drabbutu farleið, ið vit øll mangan hava upplivað, tá ið ferðast hevur verið suður.

– Suðuroyingar hava tikið skipið til sín, og eg ivist onga løtu í, at soleiðis verður tað eisini hjá okkum norðanfjørðs, segði Heðin Mortensen m. a. í røðu síni við móttøkuna av Smyrli, og borgarstjórin í Havn yngsti síðani nýggja Smyrli vælkomnum til Havnar og ynksti reiðarínum, manning og starvsfólki Guðs signing og blíðan byr.




# Veteranar tóku ímóti Smyrli

MÓTTØKA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

-Hetta er ein stór løta hjá okkum, sum hava siglt við øllum fimm Smyrlunum. Ikki minst at síggja navnaheitið "Smyril, Tvøroyri" gleðir okkum siga tær báðar Jutta Mortensen, 83 og Elin Mortensen, 85 ár, sum í ein munn taka til: "Okur eiga Smyrol". Tær báðar vóru millum mongu fólkini, sum tóku ímóti nýggja Smyrli í Havn leygardagin og mugu sigast at vera veteranar í so máta. Jutta minnist so týðuliga hennara fyrsta túr við Smirli í 1928. Tá var hon seks ára gomul. Hon minnist, hvussu illa hon spígið. Báðar gleða tær seg til at royna henda nýggja Smyril.

# Smyril eigur at sigla oftari

**– Tað er ikki ov nógv kravt, at skipið siglir oftari enn ætlað. Her kann bert talan verða um tvinnar tættir, annar er, at Løgtingið játtar meiri pengar, men tann betra loysnin er, at inntøkurnar kunnu mennast við fleiri átøkum, segði Jógvan við Keldu, landsstýrismaður m. a., tá hann tók ímóti nýggja Smyrli í Havn leygardagin**

NÝGGI SMYRIL
*Eirikur Lindenskov*
*Eirikur@sosialurin.fo*



*Jógvan við Keldu heldur, at Smyril eigur at sigla oftari, men tað krevur, at løgtingið játtar fleiri pengar*

Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum tók tað sum ein stóran heiður at kunna nýggja »Smyrli« vælkomnan á Havnina.

– Fyri viku síðani kundu vit fegnast saman við suðringum í samband við áhugaverda og væl tilrættalagda móttøku fyri »Smyrli« á Tvøroyri, júst á tí plássi, har privat fyritakssemi tók stig til at leggja lunnar undir skipaða strandferðslusigling í Føroyum fyri 110 árum síðani.

Hann segði at av teimum størru økjunum í Føroyum verða nú bara Sandoyggin og Suðuroyggin, har fasta sambandið ikki er veruleiki, og tí er tað av størsta týdningi, at henda farleið – hesin landsvegur – verður so dagførd sum gjørligt og so trygg, at fult álit dagliga kann verða á hesi leið.

Hann vísti á, hvussu sárbær hesi øki kunnu verða, tá verkfall, sum alt ov ofta stinga seg upp, kunnu leggja hesi øki lamin, hóast hesi øki í so lítlan mun eru partur av hesi abreiðsósemju.

Hann helt, at farleiðin í hesum sambandi má gerast tryggari og meira álítandi, soleiðis at henda óhepna støða bæði fyri vinnulív, farma- og fólkaflutning, og ein tílík køvandi gerð, ikki tekur seg uppaftur.

– Ov ofta hevur nú verið tosað, uttan úrslit, helt Jógvan við Keldu, sum heitti á Vinnu- og Fíggjarmálaráðið og fakfeløg um at seta seg niður og ikki helma í, fyrrenn ein verulig framtíðarloysn er funnin á økinum, so at vinnulívsfólk tora og vilja gera íløgur í størri mun, enn tey hava, á hesum økjum.

– Hetta er og verður lívsneyðugt fyri økið, og við hesum kunnu vit vísa á, at vit sum politiskur myndugleiki meina tað, vit siga, segði Jógvan við Keldu, sum eisini vísti á, at í okkara nýmótans samfelag eru samskifti og samferðsla ikki bert neyðug men eitt krav, um nøkur framgongd aftur skal verða á hesum økjum, og tí helt hann tað eisini vera tvingandi neyðugt, at fólkið, har fast samband er, skilur hetta álvarssemi.

– Vit fara tí eisni at fylgja neyvt við gongdini í siglingini hjá »Smyrli«, og hvussu hon kann mennast, tí títtleikin er ein avgerandi partur, tí er tað ikki ov nógv kravt, at skipið siglir oftari enn ætlað. Her kann bert talan verða um tvinnar tættir, annar er, at Løgtingið játtar meiri pengar, men tann betra loysnin er, at inntøkurnar kunnu mennast við fleiri átøkum. Men sum eg so ofta havi sagt, er neyðugt, at Suðuroyggin stendur saman bæði kommunur hvør sær og kommunur, vinnulív og fakfeløg, segði Jógvan við Keldu

Jógvan við Keldu takkaði at enda teimum, sum frá fyrsta degi hava tikið lut í hesum felagsátaki, sum ikki er minni enn eitt bragd.

Øll serfrøðin er samd um, hóast svart sá út fyri sløkum ári síðani, at vit eru komin sera væl burtur úr hesum hepna átaki bæði fíggjarliga og tekniskt og kanska betri, enn vit tordu at trúgva.

– Eg havi eisini heitt á Strandferðsluna, áðrenn skipið fer í skipaða sigling, at fara á eina framsýningarferð inn á Skálafjørðin og til Klaksvíkar, segði Jógvan við Keldu.

– Bæði skipi, manning og ferðafólki verður ynskt Harrans signing, nú hetta stásiliga skip fer til verka, segði Jógvan við Keldu.

# Nógv fyrireiking og gott úrslit

**Strandferðslustjórin Kristian Davidsen var millum røðararnar, tá nýggi Smyril kom á Havnina leygardagin**

SMYRIL
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í røðu síni vendi Kristian Davidsen sær til starvsfólk á Strandferðsluni og til allar føroyingar.

Hann segði m.a.:

– Seks ár eru liðin, síðani farið varð undir fyrireikingarnar til hetta nýggja og stásiliga skip. Tað var í 1999, at ein arbeiðsbólkur á SL fór undir fyrstu fyrireikingarnar. Longu í oktober árið eftir varð sáttmáli gjørdur við danska projekteringsfelagið Knud E Hansen um projekteringina, og í apríl í 2002 varð sáttmáli gjørdur við skipasmiðjusamtakið IZAR í Spania um bygging. Hóast nakað av mótráki, so eru vit í dag komin á mál, og vit síggja her eitt stásiligt skip, sum vit øll kunnu vera errin av.

Strandferðslustjórin segði, at á Strandferðsluni er nógv orka løgd í ætlanina um nýtt skip.

– Eg skal takka øllum tykkum, sum tóku stig til hesa stóru verkætlan, og sum stóðu fyri fyrireikingunum frá byrjan av. Eisini vil eg takka Vinnumálaráðnum og Innlendismálaráðnum, sum hava varað av Strandferðsluni hesa tíðina, fyri sera gott samstarv. Serstakliga vil eg takka tykkum, sum í byggitíðini hava havt eftirlitið um hendi í Spania, bæði í styttri og longri tíðarskeið. Eisini tekniskir og løgfrøðiligir ráðgevar, skipsmeklari, skipasmiðjan IZAR, skipaeftirlit, klassi - øllum tykkum takki eg fyri eitt stórt tak og væl úr hondum greitt arbeiði. Eg vil nýta høvi at ynskja øllum føroyingum hjartaliga tillukku við hesum nýggja, stásiliga fari, segði Kristian Davidsen.

– Nú er tann 5. Smyril í røðini liðugt bygdur, og tað er við stoltleika og stórum spenningi, at vit á Strandferðsluni taki ímóti hesum stásiliga og væl bygda skipi. Til seinast fari eg at ynskja øllum, serliga skipara og manning, góða eydnu og Guds signing við Smyrli. Eg vóni, at tit taka væl ímóti skipinum, og at øll fara at fara væl um tað, segði Kristian Davidsen millum annað og síðani beyð hann øllum umborð at síggja skipið.



*Kristian Davidsen, strandferðslustjóri, segði, at tað var við stoltleika, at tey á Strandferðsluni taka ímóti nýggja og 5. Smyrli*